Staðarnavnið *Grømmi* á Viðareiði

The Place-name Grømmi, *Viðareiði*

Eivind Weyhe
Lauritsargøta 10, 100 Tórshavn. Email: eivindw@setur.fo

Úrtak

Greinin er ein roynd at tolka staðarnavnið *Grømmi*, *Eystur á Grømma* á Viðareiði í Norðuroyggjum. Tað hevur verið navn á einum slætta uttangarðs, men er í dag navn á einum bústaðarøki í bygdini á Viðareiði. Niðurstøðan í greinini er at navnið upprunaliga er samansett, og at forliðið hevur verið norr. *gróf* f. 'gróv, bekk' (Heggstad), meðan eftirliðið hevur verið *munni* m. 'gap, opning, utgang' (Heggstad).

Abstract

The article attempts to explain the form *Grømmi*, which occurs in the place-name *Eystur á Grømma* in the village of Viðareiði on Viðoy in the north of the Faroes. It was once the name of a flat area of ground outside the village, but is now applied to part of the village itself, which has expanded considerably in recent years.The author concludes that *Grømmi* was originally a compound, made up of ON *gróf* f. 'hollow, watercourse' and *munni* m. 'mouth'.

Nýggjari búseting á Viðareiði

"Frá gamlari tíð og heilt upp til miðjuna av seinastu øld hevði Viðareiðis bygd havt sama andlit. Teir fýra býlingarnir vestast á tí stóra slættanum høvdu ligið óbroyttir í øldir." Soleiðis tekur J. Símun Hansen til í bókaverki sínum, *Tey byggja land* III (1975: 171). Men miðskeiðis í 19. øld tekur búsetingarmynstrið at broytast. Ein nýggjur býlingur, sum Símun nevnir *Eiðsvík*, fer at taka skap. Presturin í Ónagerði gevur monnum loyvi at leggja traðir inn eysturi í Eiðsvík burtur av Ónagerðishaganum og at búseta seg á hesum traðum. Í 1855 verður tann fyrsta trøðin innløgd heilt har eysturi móti Eiðsvík og hús bygd á henni (Hansen, 1975: 173), og í tíðini sum kemur, koma fleiri traðir og hús vestur frá hesi fyrstu innleggingini, sunnan fyri Løksará. Í 1868 byggir Jens Jacobsen sær hús á einum stað, sum tey kallaðu *Grømmin*, og húsið fekk tí navnið *Á Grømma,* og maðurin varð nevndur *Janus á Grømma* (Hansen, 1975: 188 f.). Beint vestan fyri hann fekk Óli Fr. Sørensen eina trød frá

Fróðskaparrit 62. bók 2015: 9-13. - DOI: http://dx.doi.org/10.18602/fsj.v62i0.26

presti og bygdi á henni í 1875. Hann varð seinri róptur *Ólavur á Grømma* (Hansen, 1975: 190). Sonur hansara fær sær "á Grømma" sum eftirnavn í 1939 (Hansen, 1975: 192, 195).

Navnið *Grømmi*

Fyrstu ferð navnið sæst á skrift, tykist vera í eini staðarnavnauppskrift hjá V. U. Hammershaimb frá o.u. 1850. Millum nøvn í Ónagerðishaga nevnir hann *eystur á grömma* og *Grömmagil* (tað er eitt sindur ymist sum hann brúkar stórar og smáar stavir).

Í 1992 var eg á Viðareiði og merkti nøvn upp á kort í sambandi við nýútgávu av máliborðsbløðunum, m.a. nøvn í tí haganum sum nú eitur Uppi á Váli og er partur av fyrrverandi Ónagerðishaga. Ein heimildarmaðurin, Óli Sørensen (f. 1913), búði á Grømma. Millum nøvnini sum vórðu uppmerkt, vóru *Grømmagil* og *Grømmin*, og tey komu eisini við á tað prentaða kortið (F20) frá 1994, tað seinra navnið tó í forminum *Á Grømma* (av heimildarmanninum týðiliga fatað sum bústaðarnavn). Staðið *Á Grømma* er í dag innangarðs, meðan *Grømmagil* – fyri ein part í hvussu er – er í hagapartinum Uppi á Váli.

Staðarnavnið *Grømmi(n)* er óvanligt, ja í roynd og veru er tað eindømi millum føroysk staðarnøvn, og mangur hevur undrast á hvørjum tað mundi koma av. Sjálvur havi eg fingið spurningin meir enn einaferð, og eg skal her royna at koma við einum boði uppá upprunan til navnið.

Eldri tolkingarroynd

Chr. Matras, ið sum kunnugt var viðingur, umrøður navnið í doktararitgerð síni (1933); hann sær seg ikki føran fyri at ráða gátuna um upprunan við vissu, men nevnir ein tolkingarmøguleika. Hann nevnir staðið "Grømmin, Eystur á Grømma" og sigur at tað er (Matras, 1933: 130 f.):

> "Et Parti af Ónagerðis Udmark (...); nu er en Del af dette Parti opdyrket, og det er nærmest de Huse, som staar der, der nu kaldes *Eystur á Grømma*. Er sandsynligvis et sammensat navn. Da der er en dyb Revne i Landskabet, kaldt *Grømmagil*, kunde man maaske tænke sig, at dette betydelige *gil* kunde have givet Anledning til Navnet.

Hann nevnir møguleikan at fyrra lið kundi verið kvennkynsorðið *gróv* (*grógv*), men kemur kortini til hesa niðurstøðu (Matras 1933: 131):

> Hvis man regner med **gróv* (grógv) som 1. Led, bliver andet Led vanskeligt el. umuligt at forklare. Hvis derimod 1. Led staar i Forbindelse med no[rsk] *grumma* f. 'Hul, brat Fordybning i Jorden', i Hardanger kaldt *grôma*, kunde andet Led være Ordet *hagi* m. 'Udmark, Græsgang'. Jfr. *Lambi* af **Lambhagi* flere Steder paa Færøerne (Forkortningen opstaaet i cas. obl. el. Sammensætning)".

Hetta norska orðið ið Christian nevnir sum ein tolkingarmøguleika, finna vit í *Norsk Ordbok* undir leitorðinum *grume* f. Har verður vístt til formarnar *grumma* hjá Aasen, *groma* hjá Ross og til *grommæ*, *groma* í málførum (hetta er annars sama

orð sum *gróma* kv. 'skitin blettur el. rípa' í føroyskum, sbr. eisini lýsingarorðið *grómutur*). Alf Torp (1919) byggir á Aasen og Ross og týðir *Grumma* f. sum 'hul, brat fordypning i jorden', og sigur at tað finst í Hallingdal og at tað í Hardanger eitur *grôma*. Hann spyr um orðið kann vera "Analogisk omlaging av *grubba*?", og *grubba* f. sigur hann merkir 'hulning i jorden'. Vit síggja at formarnir hjá Christiani eru teir somu sum hjá Aasen, Ross og Torp, so óivað hevur hann teir frá teimum. Tað tykist liggja í orðunum hjá Christiani at navnið kundi komið av **Grómu-haga* (?).

Nýggj tolkingarroynd

Eg haldi at vit kunnu síggja burtur frá sambandinum millum tað føroyska navnið og hatta norska orðið *grume* el. *grumma*. Orðið er ikki ávíst í føroyskum staðarnøvnum annars, og ljóðliga sæst illa hvussu *ó* skuldi verið stytt. Eg dugi heldur ikki at síggja nakran møguleika fyri at tolka navnið sum eitt ósamansett navn, altso at tað skuldi borið til at fingið eitt ósamansett navnorð sum *grømmi* el. *grómmi* at givið nakra meining.

Eg hugsi mær tí, eins og Chr. Matras ger, at navnið er samansett, men øvut av Christiani hugsi eg mær at fyrra lið í navninum er nettupp kvennkynsorðið *gró(g)v*, norr. *gróf* f. '(1) gróv, bekk. (2) grop, hole' (Heggstad). Tað orðið er vanligt í føroyskum, og tað kemur fyri í fleiri staðarnøvnum. Úr Norðuroyggjum nevnir Chr. Matras fýra nøvn, øll ósamansett og í bundnum formi: *Í Grógvni* (Gerðum), *Niðri í Grógvni* (Fugloy), *Uppi á Grógvni* (Strond) og *Grógvin á Illastíggj* (Árnafirði). Hartil kemur tað ivasama *Grógvusteinur* (Kunoy), við óregluligum hvørsfalsformi (eldri *Grógvarsteinur*?). Tey nýggjastu máliborðsbløðini (F20) hava *Grógv* el. *Í Grógvni* sum natúrnøvn í Miðvági (norðan fyri Fjallavatn), í Kirkjubøhólmi, í Saksun og í Klaksvík (Gerðum) og sum býlingsnavnið *Í Grógv* á Skála og í Syðrugøtu. Eingin ivi er um týdningin: 'Fordybning, Lavning' (Matras) og '(*stn.*) lægd, lág' (FO). Í summum førum tykist týdningurin 'gil' eisini at hóska væl. Á kortunum finna vit tað samansetta navnið *Gróddalur* í tveimum støðum, í Hesti og Saksun, úttalað /grøddæ:lur/. Dalurin í Saksun er oman fyri *Grógvna*, og í henni er *Gróddalsgjógv*. Upprunafrøðiliga hevði verið rætt at skrivað: *Grógvdalur* og *Grógvdalsgjógv*. *Gróddalur* í Hesti er á norðurendanum á oynni, í økinum sum nevnist Sundshagin, og har síggjast á kortinum tvey týðilig gil. Í Sandavágsbjørgunum vestan fyri Slættanes eru *Grótgil* og *Grótgjógv* (Petersen & Heinesen 2010: 114); mín varhugi er at eisini í teimum er forliðið *gróv* heldur enn *grót* (hesi bæði orðini hava sama framburð í hesi støðu). Samanumtikið síggja vit at *gróv* el. *grógv* er vanligt orð í føroyskum staðarnøvnum.

Seinra lið í navninum hugsi eg mær er navnorðið *munni* k. Orðið merkir 'Munding, Udgang, Ende' (Matras, 1933: 210), '(vítt) op, kjaftur' (FO), á norrønum 'gap, opning, utgang' (Heggstad), og er vanligt í málinum, báði sum felagsnavn (appellativ) og í staðarnøvnum. Í staðarnøvnum tykist tað mestsum bara vera kent sum seinra lið í samanseting. Matras nevnir hesi staðarnøvn við *-munna* úr Norðuroyggjum: *Bergsmunni* (Trøllanesi), *Bergsmunnin*

(Árnafirði, Viðareiði), *Gjómunni*(*n*) (Hattarvík, Mikladali, Viðareiði), *Líðarmunni*(*n*) (Svínoy, Syðradali), *Skorarmunni* (Norðoyri) og *Sundsmunnin* (Viðareiði). Á máliborðsbløðunum (F20) finst tað ósamansetta navnið *Munnin* í Vágum (økið har Reipsá rennur í Reipsáfoss). Annars eru serliga nógv dømir um navnið *Gjómunni*, *Á Gjómunna*, summastaðni í tí umgjørda (kvennkyns)forminum *Gjómurnar* el. *Á*/*Í Gjómunum*. FO sigur orðið *gjómunni* k. vera sjáldsamt og vísir til *gjáarmunni* k., sum verður lýst sum 'munni (t.e. tað ytsta) á gjógv, gjáarkjaftur, gjókjaftur, gjómunni'. Til tað er kortini at siga at hyggur ein at máliborðsbløðunum, sæst at støðini sum eita *Gjómunni* el. *Gjómurnar*, vanliga eru við innara (ovara) enda á eini gjógv, eitt nú Sunnarugjógv í Kvívík og Øksnagjógv í Skálabotni, og somuleiðis er *Gjáarkjafturin* við ovara enda á Gjónni Stóru í Sandvík.

Eg hugsi mær at lykilin til gátuna um navnið *Grømmi* liggur fjalt í *Grømmagili*. Í teirri brøttu norðursíðuni á Malinsfjalli eru nógv gil, og tað ásýniligasta av teimum er *Grømmagil*; tað tekur seg upp ovarlaga í fjallinum, og komið nakað oman í líðina snarar tað sær í ein bug vestureftir og heldur síðan leiðina fram parallelt við tað ovara gilið oman á slætt, og í neðra er tað meira at siga ein kluft í lendinum, sum eitt gap ella ein munni oman móti slættanum. Í tí velta lendinum niðri á sløttum sæst tað ikki so væl longur, men úr gilinum hevur ein á, sum teir nevna *Grømmagilsáin*, runnið oman í Løksará; í áarføri kundi hon vera stór, men lítið sæst til hana, tí hon er "grivin" djúp og smøl og fyri ein part løgd í rør.[i] Tað man vera hetta gilið sum hevur verið "grógvin". Beint niðan fyri munnan (í hesum føri niðara enda) á grógvni er tann stóri slættin ið nevnist *Grømmi(n)*. Hann man upprunaliga hava hitið **At Grógvmunna*, t.e. 'við munnan á grógvni'. Fyrisetingin *at* viknar vanliga til *á* í staðarnøvnum, og *Grógvmunna* verður samandrigið til *Grómma*, í hvørfalli *Grómmi*, úttalað /grømmi/. Vit sóu at í hvørfalli kundi tann bundni formurin *Grømmin* eisini koma fyri, men við fyriseting frammanfyri er navnið altíð óbundið (*Á Grømma*, *Eystur á Grømma*). *Grømmagil* er formliga sekundert í mun til *Grømma*, t.e. tað hevur fingið navn eftir slættanum og inniheldur navnið á honum. Um gilið einaferð hevur hitið **Gróv* (norr. *Gróf*), fáa vit ikki sagt við vissu. Vanligt er at tá ið staðarnøvn standa sum fyrra lið í øðrum staðarnavni, hava tey hvørsfalsform. Um so er, skuldi upprunanavnið verið **At Grógvarmunna*. Meira natúrligt er tað kortini at tað er **At Grófmunna* /grømmunna/ sum er samandrigið til *Á Grømma*.

Umgerðin av navninum skal óivað síggjast í ljósinum av teimum ljóðbroytingum sum eru farnar fram: samlíking (assimilatión) av *vm* til *mm* saman við tí at langt *ó* regluliga verður stutt *ø*. Eisini eigur stavilsið -*munn*- at vikna í hasi støðuni. Eftir hesar ljóðbroytingar kámast teir upprunaligu orðpartarnir, so at málbrúkarin ikki kennir teir aftur. Hóast dømini ikki eru heilt samlík, so er áðurnevnda navnið *Gjómunnin* sum verður til *Gjómurnar*, eitt annað dømi um at teir upprunaligu orð-

[i] Eg takki Daniali Lydersen á Viðareiði fyri upplýsingar um staðið.

partarnir ikki kennast aftur, í hvussu er ikki tann seinri.

At enda kundu vit sett okkum spurningin um tað ikki kundi verið tað áður nevnda orðið *gróma* sum var forlið í navninum, og um upprunanavnið tí ikki kann hava verið **Grómu-munni*. Ljóðfrøðiliga hevði einki verið í vegin fyri at tað kundi blivið til *Grómmi*. Tað er bara tað at *gróma* er ikki ávíst í nøkrum føroyskum staðarnavni; tað er *gró(g)v* harafturímóti, og tí man tað vera tað sannlíkasta, altso **Gróf-munni*. Úr upprunafrøðiligum sjónarhorni hevði verið rætt at skrivað høvuðssjálvljóðið við *ó* heldur enn við *ø*.

Staðarnavnið er sostatt upprunaliga eitt natúrnavn, sum í nýggjari tíð við nýggjari búseting er blivið bústaðarnavn, og sum slíkt er tað tikið í brúk sum eftirnavn.

Óprentaðar keldur

Staðarnavnasavnið á Føroyamálsdeildini, Fróðskaparsetur Føroya.

Bókmentir

F20 = *Føroyar. Topografiskt kort 1:20 000*. Geodætisk Institut / Kort og Matrikelstyrelsen. København 1987-98.

FO = *Føroysk orðabók*. Føroya Fróðskaparfelag. Tórshavn 1998.

Hansen, J. Símun. 1975: *Tey byggja Land* III. Klaksvík.

Heggstad, L. o.a.: *Norrøn ordbok*, 5. utgåva. Oslo 2012.

Matras. Chr. 1933: *Stednavne paa de færøske Norðuroyar*. Kjøbenhavn.

Norsk ordbok. Ordbok over det norske folkemålet og det norske skriftmålet IV. Det norske Samlaget. Oslo 2002.

Petersen, H. F. & J. Heinesen. 2010: *Av fjalli at fjørustrond* I. Staðarnøvn í Sandavágs sókn. Sandavági.

Ross, Hans: *Norsk Ordbog*, 1895. Ljósprent: Universitetsforlaget 1971.

Torp, Alf, 1992: *Nynorsk etymologisk ordbok*. Oslo [1. útg. 1919].

Aasen, Ivar: *Norsk Ordbog med dansk Forklaring*, 1873. Ljósprent: Fonna Forlag 1977.